# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI F-ØKI OVARLAGA VIÐ HOYDALSÁ

Orsøkin til hesa serstøku byggisamtyktina er, at ynski er sett fram um at gera eitt frítíðarøki við smáttum til frítíðaríbúðir, tjaldingarplássi og øki til húsvognar ovarlaga við Hoydalsá millum Villingardalsvegin og Sundsvegin.

Í 2005 legði býarskipanardeildin eitt mál um menning av tjaldingarplássum fyri byggi- og býarskipanarnevndina. Tá var hetta økið raðfest nr. 1 av fimm møguligum økjum.

Øki liggur í umráðispartinum F-frítíðarøki í 3. grundumráði.

At byrja við er ætlanin bert at byggja smáttur til útleigan og at hava eitt øki til at seta tjøld á. Seinni er ætlanin at gera øki til húsvognar og bygging og útgerð, sum er neyðug til hetta.

Í fyrsta umgangi er ætlanin at byggja fimm smáttur við tilsamans 10 frítíðaríbúðum á 50 $m^2$. Seinni er møguleiki fyri at økja talið av smáttum til 24 við tilsamans 41 frítíðaríbúðum.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til frítíðarøki.

1.2 at tryggja, at staðsetingin og tal av smáttum, verður sum sýnt í kortskjali 2.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og part av matr. nr. 1175a, Tórshavn

2.3 Økið er uml. uml. 30.400 m2 til støddar og liggur í F-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV §24 í almennu byggisamtyktini, er F-øki í 3. grundumráði lagt til frítíðar- og summarhús og frítíðarøkir. Skipan og bygging av økinum skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu byggjast 24 smáttur við tilsamans 41 frítíðaríbúðum, økið leggjast til tjøld og økið til húsvognar við bygging og útgerð t.d tømistøð til húsvognar wc og bað v.m., sum er neyðug til hetta, sambært kortskjali 2.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Bygging av 24 smáttum til við tilsamans 41 frítíðaríbúðum á 50 $m^2$.

4.2 Smáttur kunnu bert verða í 1 hædd við høgari reising

4.3 Mest loyvda hædd á smáttum 5,5 m.

4.4 Smátturnar skulu litsetast soleiðis at tær fella inn í landslagið t.d. við brúk av jørðlitum.

4.5 Øll bygging á økinum er treytað av krøvum sum byggi- og umhvørvisdeildin setur

## § 5. VEGIR, PARKERINGSPLÁSS OG UTTANUMØKIR

5.1 Koyrivegur til økið er frá Villingardalsvegnum.

5.2 Vegir inni á økinum skulu gerast soleiðis, at neyðsendarakfør uttan trupulleikar kunnu koma til.

5.3 Pláss skal vera til parkering av 2 bilum fyri hvørja smáttu.

5.4 Skráar ímóti verandi lendi og fríøkir inni á frítíðarøkinum skulu sáast við grasi ella plantast eftir góðkendari ætlan.

## § 6. UMHVØRVISKRØV

6.1 Byggiloyvi til smáttir er treytað av, at frárenning er gjørd sambært krøvum frá byggi- og umhvørvisdeildini.

6.2 Byggiloyvi til framtíðar bygging og útgerð er treytað av krøvum frá byggi- og umhvørvisdeildini.

6.3 Smátturnar kunnu bert nýtast sum frítíðarhús og ikki sum fastur búðstaður.

6.4 Girðast skal um alt øki við vanligum seyðahegni sambært vegleiðing um uppsetan av hegni hjá Tórshavnar kommunu

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
| --- | --- |
| Mál nr.: | 13/00902 |
| Góðkent: | 20/3-2014 |
| Dagfesting: | 20/3-2014 |
| Váttað: | [illegible] |




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heiti: | F-øki við Hoydalsá | | |
| Viðmerking: | Skipan av økinum | | |
| Skjal nummar: 2 | | Journal nr: 2013-1839 | |
| Dagur: 03.09.2013 | Mát: | | Tekna: MKJ/KF |
| Rættað: | | | |




**Tórshavnar Kommuna**
Byggi- og býarskipanardeildin

| | | | |
|---|---|---|---|
| Heiti: F-øki við Hoydalsá | | | |
| Viðmerking: Yvirlitskort | | | |
| Skjal nummar: 1. | | Journal nr: 2013-1839 | |
| Dagur:03.09.2013 | Mát: | Tekna: MKJ/KF | |
| Rættað: | | | |

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
20. mars 2014
Mál: 13/00902-9
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: EA/KHP

Tygara skriv: 2013-1839/6 SG

**Viðvíkjandi nýggjari serstakari byggisamtykt fyri F-frítíðarøki við Hoydalsá**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013, hevur Tórshavnar kommuna sent Fiskimálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri F-øki ovarlaga við Hoydalsá til góðkenningar.

Kommunan biður í skrivi, dagfest 22. november 2013, um loyvi til at gera serstaka byggisamtykt til at skipað eitt frítíðarøki við frítíðarhúsum og teltplássi ovarlaga við Hoydalsá. Uppskotið fevnir um part av matr. nr. 1175a, Tórshavn.

Uppskotið hevur ligið alment frammi frá 7. til og við 28. oktober 2013. Tá freistin at koma við møguligum mótmælum ella broytingaruppskoti var úti, 18. november 2013, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Fiskimálaráðið hevur havt málið til ummælis hjá Býarskipanarnevndini, sum hevur latið ráðnum álit í málinum, hjá hjálagda avrit, dagfest 10. desember 2013.

Ráðið hevur havt samband við kommununa og víst á at ymisk viðurskiftir, sum skulu verða í einari serstakari byggisamtykt, tá talan er um frítíðarhús. Kommunan hevur síðani tikið hetta til eftirtektar og hevur tikið atlit at hesum í verandi teksti í serstøku byggisamtyktini.

Vísandi til omanfyristandandi verður sagt frá, at Fiskimálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini, góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri F-øki ovarlaga við Hoydalsá.

Mint verður á, at hóast serstaka byggisamtyktin er góðkent av Fiskimálaráðnum, so sleppur kommunan ella viðkomandi borgari ikki undan at fáa møguligar aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum, áðrenn bygging kann byrja, t.d. frá friðingarmyndugleikanum, ið sambært aðrari lóg kann seta krøv til byggingar.

Hjálagt er rættaður tekstur fyri serstøku byggisamtyktina við átekning frá Fiskimálaráðnum.

Vinarlig heilsan

Elinborg Apol
løgfrøðingur

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo